Har vit skulu gjalda, skulu vit eisini valda

Ein av fremstu uppgávunum hjá nýggja formanninum í Føroya Kommunufelag, verður at tryggja, at kommunurnar sleppa at valda, har tær skulu gjalda. Men hann ætlar eisini at gera sítt til, at allar kommunurnar í landinum verða savnaðar undir sama hatti

FORMANSSKIFTI

Áki Bertholdsen

Har kommunurnar skulu gjalda, skulu tær eisini valda.

Tao verour eftir øllum at døma eitt av slagorounum hjá nyvalda formanninum í Føroya Kommunufelag.

Jacob Vestergaard, sum nú tekur vio formansstarvinum í Føroya Kommunufelag eftir Jógvan K. Mørkøre á Eioi, sigur, at tao nyggja stýrio fer ivaleyst at halda fram vio arbeiOinum, sum undanfarna stýrio legoi lunnar undir.

– Men nú er nýtt fólk komio í stýrio, og tao er gott fólk, sum hevur sínar hugsanir og tey fara uttan iva at skera kósina hjá Kommunufelagnum út í kortio.

Hóast Jacob Vestergaard er nyvaldur formaour í Kommunufelagnum, er arbeioio ikki ókent hjá honum, tí hann hevur verio stýrislimur í seinastu trý árini.

Hann sigur, at uppgávan hjá Kommunufelagnum verour ennsumáour, at tala søk kommununar og at veroa vio í arbeiOinum, sum fer fram á løgarøkinum, tá io kommunupolitikkur er á skránni.

– Vit skulu sjálvandi ansa eftir, at kommunurnar veroa hoyrdar, tá io viourskifti, sum viovíkja okkum, eru á skránni.

Greiður skilnaður ímillum land og kommunur

Jacob Vestergaard sigur, at ein av fremstu uppgávunum verour at fáa greio viouskifti ímillum landio og kommunurnar.

– Eitt mál, sum Kommunufelagio hevur arbeitt nógv vio, er at fáa eittgreitt uppgávubytio ímillum landio og kommunurnar.

Hann sigur, at í løtuni er tao í fleiri førum ógreitt, hvør hevur ábyrgdina av hvørjum, eitt nú á almanna- og sosialøkinum.

– Eitt nú hava fleiri kommunur bygt sambýli, men tao er landio, sum setir treytirnar. Eitt annao dømi er, nú kommunurnar fingu ábyrgdina av barnaansingini. Tá io sáttmálar vóru gjørdar ímillum kommunur og fakfeløgini hjá dagrøktarunum, hendi tao, at Landsstýrio legoi seg út í smálutir í sáttmálunum og tao tarnaoi málinum ræðiliga illa.

Jacob Vestergaard leggur stóran dent á, at kommunurnar sleppa at valda, har tær skulu gjalda.

– Sjálvsagt skal eftirlit vera. Og sjálvsagt skulu vit hava rammulógir. Men tær skulu ikki ganga kommununum ov nær. Tær skulu ikki vera so tvingar, at tær forða kommununum í at finna rímiligar loysnir, um tao so í summum førum eru óvanligar loysnir. Landio skal ikki løggeva niour í smálutir í kommunalum viouskiftum.

Og sjálvsagt verour tao eisini ein av høvuosuppgávunum hjá felagnum at tryggja, at peningur fylgir vio, hvørja ferð kommunurnar yvirtaka eitt málsøki frá landinum.

Hann sigur, at hesa næstu tíðina fer Kommunufelagio ikki minst at fylgja væl vio arbeiOinum at gera eina tilbúgving fyri allar Føroyar. Tao er ein ætlan, sum kommunurnar koma at hava ræðiliga nógv vio at gera m.a. tí at kommunurnar hava sløkkilioini.

Samstundis eru kommunurnar eisini vio í arbeiOinum á eldraøkinum, sum helst hevur til endamáls at leggja tao út til kommunurnar at umsita.

Sameina kommunurnar

Men nyvaldi formaourin í Kommunufelagnum sigur, at eitt tao fyrsta, hann ætlar at royna, er, um tao ber til sameina allar kommunurnar í sama felag.

– Eg veit ikki um tao er møguleiki fyri tí. Men ber tao upp á nakran máta til, ætla vio í Kommunufelagnum at at gera okkara til, at sameina allar kommunurnar í sama felag.

Hann sigur, at kunstuin verour at samansjóoa valdsbytio ímillum tær stóru kommunurnar og tær smáu.

– Sjálvandi skulu tær lítlu kommunurnar hava eitt oro at siga. Men tao er líka sjálvsagt, at tær kunnu ikki hava líka stórt vald sum tær stóru kommunurnar.

Men hann vísir á, at bæoi Kommunufeløgini eru áhugafeløg. Og tá io kommunal viouskifti eru á skránni, eru áhugamálini í heilt nógvum førum tey somu.

– Tao hevoi verio ein stórur fyrimunur, sum vit vóru í einum felag, tí so høvdu vit vita betri av hvørjum øorum, tí oftani tosa vit sama mál kortini.

Eitt liðugt kapittul

Hinvegin heldur nyggi formaourin í Føroya Kommunufelag, at spurningurin um at leggja kommunur saman, er eitt yvirstaoio kapittul í føroyskari kommunusøgu.

– Eg var sjálvur heitur talsmaour fyri at leggja saman. Men nú er alt kjak um samanlegging fario.

Hann sipar til, at eitt stórt kommunumálit kom, har tao varo lagt upp til eina fasta mannagongd um, hvussu farast skuldi fram, tá io samanleggingin skuldi fremjast.

– Men alt tao arbeioi varo lagt til víks, tí landsstýrio ásannao i, at tao er ikki politiskur meiriluti fyri at leggja kommunur saman vio lóg. Og sjálvar vildu kommunurnar ikki leggja saman.

Jacob Vestergaard heldur tí, at tao loysir seg ikki longur at brúka fleiri kreftir upp á tao málio.

– Nú mugu kommunurnar heldur royna at finna aorar hættir at samstarva uppá, heldur hann.

Annars er eitt uppskot til viogeroar um sjálvboðna kommunusamanlegging, men tao skilst, at tí væntar hann sær ikki so nógv av.

Men hann heldur, at landsstýrio tíverri er fario at gera lógir, sum stríoa ímóti veruleikanum sum er.

– Landsstýrio vil ikki leggja kommunur saman vio lóg. Men tær lógir, sum veroa gjørdar, veroa gjørdar til størri eindir, eitt nú lógin um kommunustýri, sum varo samtykt stutt fyri jól. Tann lógin er gjørd til stórar kommunur. Lógin setir kommununum ymsar treytir. Men andsøgnin í lógini eru, at tao er í fleiri førum heimild til at gera undantøk fyri tær smærru kommunurnar.

– Jacob Vestergaard heldur, tao er skeivt at gera lógirnar, sum um vit høvdu stórar kommunur í Føroyum, tá io veruleikin er, at vit hava nógvar smáar kommunur og fáar stórar.

Honum dámar heldur ikki tankan um, at landsstýrio ætlar at leggja fleiri økir út til kommunurnar at umsita í vóni um, at tær so fara at leggja saman.

– Antin veroa kommunurnar lagdar saman og løggávan gjørd eftir tí. Ella veroa tær ikki lagdar saman og so verour løggávan gjørd eftir tí, heldur hann.

– Á umboðsráðsfundi í Føroya Kommunufelag varð nýggj leiðsla vald. Nýggi formaðurin ætlar at leggja stóran dent á at sameina allar kommunur í eitt felag

– Alt tos um at leggja kommunur saman er eitt yvirstaðið kapittul, heldur Jacob Vestergaard, sum nú er formaður í Føroya Kommunufelag

Gólvuppboðssølan

35 bátar seldu mánadagin góð 21 tons á gólvsøluni hjá Fiskamarknaðinum

Sýslunummar	Skipsnavn	Reiðskapur	kilo
FD 79	HAVØRNIN	SNELLA	99
FD 160	SVANANES	LÍNA	127
FD 420	REYNIR	SNELLA	1.669
FD 472	STØÐIN	LÍNA	664
FD 663	BRANDUR	LÍNA	2.184
FD 761	GUNNVÁ	SNELLA	819
FD 900	HØVNIN	LÍNA	1.094
FD 968	SJÓSTJØRNAN	SNELLA	41
KG 123	HÁENNI	LÍNA	1.069
KG 125	BJARNABERG	SNELLA	146
KG 129	BRATTABERG	SNELLA	196
KG 288	HELTNIN	SNELLA	39
KG 363	MIÐHAMAR M/B	SNELLA	90
KG 423	JASPISSTEINUR	SNELLA	80
KG 47	HAVSBRÚN	LÍNA	2.760
KG 640	HANSA	SNELLA	166
KG 642	BRAGD	LÍNA	2.676
KG 708	VÁRSÓL	SNELLA	207
KG 78	STAKKUR	LÍNA	731
KG 832	BORGIN	SNELLA	127
KG 94	BRID FORD	SNELLA	66
TG 22	HAVGÁSIN	SNELLA	856
TG 26	MAJBRITT	SNELLA	1.101
TG 339	BÁRAN	SNELLA	276
TG 349	TRÝ DRANGUR	SNELLA	736
TG 66	MARIAN M.	SNELLA	680
TG 670	VÍKABERG	SNELLA	486
TN 919	MORGUNROÐIN	SNELLA	90
VA 141	ÁLKUKLETTUR M/B	SNELLA	437
VA 28	ÁLITIÐ	SNELLA	326
VA 324	SKARVUR	SNELLA	346
VA 60	DÁVA DÁNJAL	SNELLA	319
VA 82	RADNES	SNELLA	164
VN 266	ELSA M/B	SNELLA	250
VN 408	JÓNVØR	SNELLA	387